Stjørnan-Kyndil 28-11 (12-4):

# Stjørnan aftur fremst

**Seinkaði dysturin móti Kyndli varð av-greiddur hóskvøldið, og so er Stjørnan aftur á odda**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir at hava mist oddasessin eina tíð, vann Stjørnan seg aftur á ovastu rók hóskvøldið.

Beinleiðis orsøkin til, at onnur lið vóru farin upp um Stjørnuna, var, at liðnum restaði tveir dystir at spæla, tí ávíkavist Tjaldur og Kyndil góvu avboð til dystirnar í Klaksvík.

Leingi tvíhildu tey í Stjørnuni um, at dystirnir als ikki skuldu spælast, men hóskvøldið varð dysturin móti Kyndli so avgreiddur, og endaliga úrslitið varð ein tryggur heimasigur

Spenning var ongantíð talan um í KÍ-høllini, har Stjørnan frá fyrsta bríksli legði seg framum. Hetta gav so eisini venjaranum høvi til at lata nakrar av yngru leikarunum sleppa framat, og enn einaferð markeraði blaðunga Louisa Andreasen seg væl hjá oddaliðnum.

## FAKTA UM DYSTIN

**Stjørnan-Kyndil 28-11 (12-4)**
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Katarina Stepanov 6, Anna Kristina Samson 5, Annika Ljósstein 4(3), Beinta Joensen 3, Una Olsen 3, Louisa Andreasen 2, Maria við Neyst 2, Joan M. Djordjevic 2(1), Bára S. Klakstein 1
**Kyndil:** Randi Wardum 5, Hildur Mikkelsen 3, Ann-Mari Wang 2, Linda Weihe 1
**Brotskøst:** Stjørnan 6, Kyndil 1
**Útvísingar:** Stjørnan 3, Kyndil 2
**Dómarar:** Pole Hansen & Hartvig Joensen

# Føroyingar eiga í Manchester United

Ein partur av partapeninginum í heimsins ríkasta fótbóltsfelag, Manchester United, eru partabrøv, sum viðhaldsfólk hjá felagnum eiga.

Hesi hava langt síðani tikið seg saman í felagsskapin, Shareholders United, soleiðis at teirra rødd eisini skal verða hoyrd í felagnum, tó at tey helst mangan kundu hugsað sær, at hon varð betri hoyrd.

Herfyri hevði Manchester Evening News orðið á formannin í felagnum hjá viðhaldsfólkunum, og millum tað, sum hesin segði, var, at hann var imponeraður av, at tað sjálvt í Føroyum vóru limir, sum áttu í felagnum.

– Vit hava limir í 70 londum kring allan heim. Sjálvt í Føroyum hava vit 15 limir, og nógv longur enn hetta koma vit so ikki at røkka sigur Sean Bones við blaðið.

Til samanberingar kann sigast, at tað í Danmark eru 224 limir í felagnum, so her eru føroyingar væl við.

-jm

W W W . S O S I A L U R I N . F O

Sosialurin
Sosialurin i



Hevur tú lisið dagsins avbjóðing og dagsins tanka?
Heimasíðan gevur tær møguleika fyri at menna tín hugburð hvønn dag

VITJA OKKARA HEIMASÍÐU Á
www.heilbrigdid.fo

Viðgerðarheimið Heilbrigdið, Velbastað
Tlf. 32 80 55 ella 32 80 17
Familjudeildin: Tlf. 31 81 60 Eftirviðgerð: Tlf. 31 81 60 ella 32 80 55

REPROZ

LEYGARDAGIN 18. DESEMBER
lata vit 20% av øllum pløggum og av tógvi





OPIÐ ER FRÁ
kl. 10.00 til kl. 20.00

SNÆLDAN
BOKS 70
490 STRENDUR
tel 44 71 54
fax 44 90 21

SNAELDAN@POST.OLIVANT.FO

SNÆLDAN
NIELS FINSENSGØTA 25
100 TÓRSHAVN
tel 35 71 54

SNÆLDAN